Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 11.02.2021
Mál nr.: 20/00427
Málsviðgjørt: TM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 3 *2. stk.* Landsstýrinum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í sambandi við fyrisitingina av hesari lóg.	§ 3 *2. stk.* Landsstýrismanninum verður heimilað at seta nærri reglur um nýtslu av vøruskránni í sambandi við fyrisitingina av hesari lóg.
§ 4. Fyri vørur, ið ikki koma undir stk. 2, skal rindast tollur sum ásett í toll- og vøruskránni. Tollsatsirnir eru hjálagdir sum fylgiskjal. *2. stk.* Fyri vørur, ið eru umfataðar av handilssáttmálum millum Føroyar og onnur lond ella felagsskapir, fellur tollurin burtur ella verður lækkaður sambært landsstýrisins fyriskipan, tá ið viðkomandi sáttmáli er góðkendur av Føroya Løgtingi. *3. stk.* Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um upprunareglur.	§ 4. Fyri vørur, ið ikki koma undir stk. 2, skal rindast tollur sum ásett í toll- og vøruskránni. Toll- og vøruskráin er lýst sum skjal 1 til hesa lóg. *2. stk.* Fyri vørur, ið eru umfataðar av handilssáttmálum millum Føroyar og onnur lond ella felagsskapir, fellur tollurin burtur ella verður lækkaður sambært landsstýrismansins fyriskipan, tá ið viðkomandi sáttmáli er góðkendur av Føroya Løgtingi. *3. stk.* Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um upprunareglur. *Stk. 4.* Fyri tær í skjali 2 og 3 nevndu framleiðslur er tollfrítøkan avmarkað til ásettu nøgdirnar.

§ 5. Toll- og vøruskráin er til skjals og kann keypast frá Toll- og Skattstovu Føroya. Landsstýrið ásetur gjaldið fyri toll- og vøruskránna.	§ 5 verður strikað
§ 6. Undantikið tolli er: a. Ferðagóðs, t.v.s. klæðir og aðrir ferðalutir, sum ferðafólk hava í viðføri, tá ið tollvaldið heldur, at nøgd og slag er sovorðið, at ferðafólkið kann ætlast at hava tað til egna nýtslu á ferðini. Tann eftirlitsansan, ið tørvur er á, verður sett av landsstýrinum, sum hevur heimild at geva loyvi til frían innflutning av smálutum, sum ferðafólk hevur við sær, tá ið tollurin lítið og einki hevur at týða. b. Flytigóðs, tá ið ánarin hevur verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlondum í minsta lagi 1 ár, tá ið lutirnir bera merki av at vera brúktir, og tá ið teir verða innfluttir fyri rokning ánarans og til nýtslu fyri tey, ið brúkt teir hava frammanundan. Um hetta verður latin váttan uppá æru og trúgv. Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri reglur um, hvørjir lutir eru flytigóðs, treytir fyri innflutningi og úr hvørjum londum hesir lutir kunnu innflytast. c. ... d. ... e. ... f. ... g. ... (litra g verður strikað.) h. ... i. ...	§ 6. Undantikið tolli er: a. Ferðagóðs, t.v.s. klæðir og aðrir ferðalutir, sum ferðafólk hava í viðføri, tá ið tollvaldið heldur, at nøgd og slag er sovorðið, at ferðafólkið kann ætlast at hava tað til egna nýtslu á ferðini. Tann eftirlitsansan, ið tørvur er á, verður sett av landsstýrismanninum, sum hevur heimild at geva loyvi til frían innflutning av smálutum, sum ferðafólk hevur við sær, tá ið tollurin lítið og einki hevur at týða. b. Flytigóðs, tá ið ánarin hevur verið búsettur í hinum partinum av ríkinum ella í útlondum í minsta lagi 1 ár, tá ið lutirnir bera merki av at vera brúktir, og tá ið teir verða innfluttir fyri rokning ánarans og til nýtslu fyri tey, ið brúkt teir hava frammanundan. Um hetta verður latin váttan uppá æru og trúgv. Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta nærri reglur um, hvørjir lutir eru flytigóðs, treytir fyri innflutningi og úr hvørjum londum hesir lutir kunnu innflytast. c. ... d. ... e. ... f. ... g. ... h. ...
§ 7. Tollvaldinum verður heimilað at veita tollfrían innflutning við eftirliti: a. fyri tað, ið skipum og flogførum tørvar, meðan tey eru stødd á tolløkinum, b. ... c. ... d. ... e. ... f. ... g. ... h. ...	§ 7. Tollvaldinum verður heimilað at veita tollfrían innflutning við eftirliti: a. fyri tað, ið skipum og flogførum tørvar til nýtslu umborð, meðan tey eru stødd á tolløkinum og sum tey hava við, tá tey koma í føroyskt tolløki b. ... c. ... d. ... e. ... f. ...

i. fyri lutir, eykalutir og eykaútgerð til flogfør eins og fyri flogvenjingarútgerð og fyri lutir, eykalutir og útgerð til hesar. Landsstýrið kann gera skrá yvir, hvørjar vørur koma undir tollfrælsi smb. hesari reglu, og j. fyri ávísar vørur úr menningarlondum. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri hesum.	g. ... h. ... i. fyri lutir, eykalutir og eykaútgerð til flogfør eins og fyri flogvenjingarútgerð og fyri lutir, eykalutir og útgerð til hesar. Landsstýrismaðurin kann gera skrá yvir, hvørjar vørur koma undir tollfrælsi smb. hesari reglu, og j. fyri ávísar vørur úr menningarlondum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur fyri hesum.
§ 8. Landsstýrinum verður heimilað at seta á stovn tollfríar sølubúðir á flogvøllinum. Sum tollfríar vørur, ið verða seldar í slíkum vørubúðum, eru at rokna vørur, ið eru frítiknar fyri toll. Føroyskt framleiddar vørur og innfluttar vørur, ið eru tollgreiddar, kunnu fáa tollin afturrindaðan, tá ið vørur verða latnar til hesar sølubúðir. Sølubúðirnar fáa loyvi at selja vørur, sambært loyvi frá landsstýrinum. Sambært fyriskipan landsstýrisins kann loyvi verða givið at selja til farandi og komandi ferðafólk. Landsstýrið ásetur í kunngerð reglur um loyvi, skipan um hvørjar vørur, ið kunnu seljast í slíkum sølubúðum, eftirlit tollvaldsins við sølubúðunum, treytir fyri starvsfólki o.s.fr. í kunngerð við heimild í hesari lóg kann ásetast, at brot móti reglum í kunngerð kunnu verða revsað við bót ella fongsul upp til 1 ár, um lóggávan annars ikki ásetur strangari revsing. *Stk. 2.* Regluligt uttanlands ferðamanna- ella farmasamband kann bert setast á stovn við loyvi frá Toll- og Skattstovuni.	§ 8. Landsstýrismanninum verður heimilað at seta á stovn tollfríar sølubúðir á flogvøllinum. Sum tollfríar vørur, ið verða seldar í slíkum vørubúðum, eru at rokna vørur, ið eru frítiknar fyri toll. Føroyskt framleiddar vørur og innfluttar vørur, ið eru tollgreiddar, kunnu fáa tollin afturrindaðan, tá ið vørur verða latnar til hesar sølubúðir. Sølubúðirnar fáa loyvi at selja vørur, sambært loyvi frá landsstýrismanninum. Sambært fyriskipan landsstýrismansins kann loyvi verða givið at selja til farandi og komandi ferðafólk. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð reglur um loyvi, skipan um hvørjar vørur, ið kunnu seljast í slíkum sølubúðum, eftirlit tollvaldsins við sølubúðunum, treytir fyri starvsfólki o.s.fr. í kunngerð við heimild í hesari lóg kann ásetast, at brot móti reglum í kunngerð kunnu verða revsað við bót ella fongsul upp til 1 ár, um lóggávan annars ikki ásetur strangari revsing. *Stk. 2.* Regluligt uttanlands ferðamanna- ella farmasamband kann bert setast á stovn við loyvi frá TAKS.
8 a. Toll- og Skattstovu Føroya verður heimilað at veita tollfrían innflutning við eftirfylgjandi eftirliti av vørum, ið verða innfluttar til brúk undir bjargingartiltaki í sambandi við stórvanlukku ella náttúruvanlukku, har brúk er fyri bráðfeingis hjálp, um talan er um neyðstøðu á føroyskum land- ella sjóøki. *2. stk.* Í seinasta lagi 14 dagar eftir at vøran er komin á tolløkið, skal Toll- og Skattstova Føroya hava yvirlit yvir slag og nøgd av vøruni, ið er innflutt.	8 a. TAKS verður heimilað at veita tollfrían innflutning við eftirfylgjandi eftirliti av vørum, ið verða innfluttar til brúk undir bjargingartiltaki í sambandi við stórvanlukku ella náttúruvanlukku, har brúk er fyri bráðfeingis hjálp, um talan er um neyðstøðu á føroyskum land- ella sjóøki. *2. stk.* Í seinasta lagi 14 dagar eftir at vøran er komin á tolløkið, skal TAKS hava yvirlit yvir slag og nøgd av vøruni, ið er innflutt. *3. stk.* Vøra, ið kemur undir tollfrítøkuna, skal verða útflutt aftur í seinasta lagi 12

3. stk. Vøra, ið kemur undir tollfrítøkuna, skal verða útflutt aftur í seinasta lagi 12 mánaðir eftir, at hon er komin inn. Toll- og Skattstova Føroya kann leingja hesa freist, um tað er neyðugt.	mánaðir eftir, at hon er komin inn. TAKS kann leingja hesa freist, um tað er neyðugt.
§ 9. Vørur, ið verða fluttar inn á tolløkið til góðskingar, kunnu flytast inn uttan at rinda toll smb. nærri treytum ásettar av landsstýrinum. *2. stk.* Vørur, ið verða fluttar av tolløkinum til góðskingar ætlandi til innflutning seinni, kunnu flytast inn við tolllætta smb. nærri treytum ásettar av landsstýrinum.	§ 9. Vørur, ið verða fluttar inn á tolløkið til góðskingar, kunnu flytast inn uttan at rinda toll smb. nærri treytum ásettar av landsstýrismanninum. *2. stk.* Vørur, ið verða fluttar av tolløkinum til góðskingar ætlandi til innflutning seinni, kunnu flytast inn við tolllætta smb. nærri treytum ásettar av landsstýrismanninum.
§ 10 b. Flutningsfeløg hava skyldu til at lata Toll- og Skattstovu Føroya góðsupplýsingar elektroniskt. *Stk. 2.* Í serligum førum kann Toll- og Skattstova Føroya gera undantak frá stk. 1.	§ 10 b. Flutningsfyritøkur og speditørar hava skyldu til at lata TAKS góðsupplýsingar elektroniskt. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um upplýsingarskylduna. *Stk. 2.* Í serligum førum kann TAKS gera undantak frá stk. 1.
§ 11. *2. stk.* Gjaldskylduga virðið verður ásett eftir reglum, ið eru fyrisettar av landsstýrinum í samsvari við ásetingarnar í avtalu um nýtslu av grein VII í Almenna sáttmálanum um tollskráir og samhandil (GATT).	§ 11. *2. stk.* Gjaldskylduga virðið verður ásett eftir reglum, ið eru fyrisettar av landsstýrismanninum í samsvari við ásetingarnar í avtalu um nýtslu av grein VII í Almenna sáttmálanum um tollskráir og samhandil (GATT).
§ 12 *3. stk.* Vørur eiga bert at vera uppskipaðar á plássum, sambært landsstýrisins fyriskipan.	§ 12 *3. stk.* Vørur eiga bert at vera uppskipaðar á plássum, sambært landsstýrismansins fyriskipan.
§ 13. Vørur mugu ikki verða útflýggjaðar, áðrenn tollgreiðsla er framd, og um tær eru tollskyldugar, áðrenn tollurin er goldin. Verður hetta kortini gjørt, stendur skiparin ella flutningsfyritøkan til svars fyri, at tollurin verður goldin, og kann hesum haraftrat áleggjast sekt. *2. stk.* Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild til at gera undantak frá hesi reglu, soleiðis at innflytarar kunnu fáa vørurnar beinleiðis útflýggjaðar. Treytirnar fyri hesum eru, at vørurnar verða tollavgreiddar elektroniskt, at peningatrygd verður veitt, og at tollur og avgjøld verða goldin innan eina nærri ásetta tíð. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetir nærri reglur viðvíkjandi teimum her tilskilaðu undantøkum. *3. stk.* Í serligum føri kann Toll- og Skattstova Føroya eftir umsókn geva	§ 13. Vørur mugu ikki verða útflýggjaðar, áðrenn tollavgreiðsla er framd, og um tær eru tollskyldugar, áðrenn tollurin er goldin. Verður hetta kortini gjørt, stendur skiparin, flutningsfyritøkan ella speditørurin til svars fyri, at tollurin verður goldin, og kann hesum haraftrat áleggjast sekt. *2. stk.* TAKS hevur heimild til at gera undantak frá hesi reglu, soleiðis at innflytarar kunnu fáa vørurnar beinleiðis útflýggjaðar. Treytirnar fyri hesum eru, at vørurnar verða tollavgreiddar elektroniskt, at peningatrygd verður veitt, og at tollur og avgjøld verða goldin innan eina nærri ásetta tíð. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetir nærri reglur viðvíkjandi teimum her tilskilaðu undantøkum. *3. stk.* Í serligum føri kann TAKS eftir umsókn geva flutningsfyritøkum og

flutningsfeløgum loyvi at flyta vørur beinleiðis til móttakaran, treytað av at tollavgreiðslan verður gjørd elektroniskt, og at trygd frammanundan er veitt fyri tolli og avgjøldum. Flutningsfyritøkan ábyrgist fyri og hevur ábyrgd av, at tollur og avgjøld verða goldin. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann áseta nærri reglur viðvíkjandi teimum her tilskilaðu undantøkum, umframt at áseta reglur um, hvussu skjøl viðvíkjandi tollavgreiðsluni skulu goymast. *4. stk.* Toll- og Skattstova Føroya kann krevja trygd frá skipaavgreiðslum og øðrum flutningsfeløgum fyri toll og avgjøld á vørum, ið verða útflýggjaðar uttan loyvi frá Toll- og Skattstovuni.	speditørum loyvi at flyta vørur beinleiðis til móttakaran, treytað av at tollavgreiðslan verður gjørd elektroniskt, og at trygd frammanundan er veitt fyri tolli og avgjøldum. Flutningsfyritøkan ella speditørurin ábyrgist fyri og hevur ábyrgd av, at tollur og avgjøld verða goldin. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann áseta nærri reglur viðvíkjandi teimum her tilskilaðu undantøkum, umframt at áseta reglur um, hvussu skjøl viðvíkjandi tollavgreiðsluni skulu goymast. *4. stk.* TAKS kann krevja trygd frá flutningsfyritøkum og speditørum fyri toll og avgjøld á vørum, ið verða útflýggjaðar uttan loyvi frá TAKS.
§ 14. Allir vinnuligir innflytarar hava skyldu at skráseta seg hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Almennir stovnar, herundir kommunalir, koma undir somu skyldu. *Stk. 2.* Toll- og Skattstova Føroya tillutar virkjum og stovnum, sum innflyta vinnuligt, eitt skrásetingartal (v-tal). Talið og skrásetta virkisnavnið skal nýtast í einum og hvørjum samskifti við Toll- og Skattstovu Føroya. *Stk. 4.* Hevur virkið fleiri skrásetingartøl, kann Toll- og Skattstova Føroya tilluta virkinum eitt høvuðstal.	§ 14. Allir vinnuligir innflytarar hava skyldu at skráseta seg hjá TAKS. Almennir stovnar, herundir kommunalir, koma undir somu skyldu. *Stk. 2.* TAKS tillutar virkjum og stovnum, sum innflyta vinnuligt, eitt skrásetingartal (v-tal). Talið og skrásetta virkisnavnið skal nýtast í einum og hvørjum samskifti við TAKS. *Stk. 4.* Hevur virkið fleiri skrásetingartøl, kann TAKS tilluta virkinum eitt høvuðstal.
§ 16 *2. stk.* Landsstýrið kann áseta serligar fyriskipanir um tollviðgerð av sendingum, ið hava eitt tollvirði yvir kr. 3.000. *3. stk.* Landsstýrið kann áseta serligar fyriskipanir um tollviðgerð av sendingum, ið hava eitt tollvirði upp á kr. 3.000 og undir. *5. stk.* Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um tænastugjald, tá ið umtolling fer fram smb. 2. og 3. stk.	§ 16 *2. stk.* Landsstýrismaðurin kann áseta serligar fyriskipanir um tollviðgerð av sendingum, ið hava eitt tollvirði yvir kr. 3.000. *3. stk.* Landsstýrismaðurin kann áseta serligar fyriskipanir um tollviðgerð av sendingum, ið hava eitt tollvirði upp á kr. 3.000 og undir. *5. stk.* Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um tænastugjald, tá ið umtolling fer fram smb. 2. og 3. stk.
§ 17. Tollur verður uppkravdur eftir ásetan landsstýrisins og við atstøðu frá løgregluni og postverkinum.	§ 17. Tollur verður uppkravdur eftir ásetan landsstýrismansins og við atstøðu frá løgregluni og postverkinum.
§ 18. Er tollur ikki greiddur í seinasta lagi 2 mánaðir aftaná, at gjaldsfreistin er úti, kann tollvaldið selja vørurnar fyri rokning móttakarans við almenna uppboðssølu til rindan av tolli v.m., ella kann tollvaldið fyri	§ 18. Er tollur ikki greiddur í seinasta lagi 2 mánaðir aftaná, at vøran er uppskipað á tolløkinum ella um vøran ikki verður uppskipað, tá vøran er komin til tolløkið, kann tollvaldið selja vørurnar fyri rokning

ábyrgd móttakarans, koyra vørurnar burtur undir tolleftirliti. Er talan um vørur, ið eftir lóggávuni ikki mugu seljast á tolløkinum, skal tann, ið hevur vørurnar í varðveitslu sum skjótast aftaná, at 2 mánaða freistin er úti, útvega, at vørurnar verða fluttar av aftur tolløkinum ella burturbeindar undir tolleftirliti.	móttakarans við almenna uppboðssølu til rindan av tolli v.m., ella kann tollvaldið fyri ábyrgd móttakarans, koyra vørurnar burtur undir tolleftirliti. Er talan um vørur, ið eftir lóggávuni ikki mugu seljast á tolløkinum, skal tann, ið hevur vørurnar í varðveitslu sum skjótast aftaná, at 2 mánaða freistin er úti, útvega, at vørurnar verða fluttar av aftur tolløkinum ella burturbeindar undir tolleftirliti.
§ 18 a. Sum frígoymsla er at skilja hølir, ið eru á føroyska tolløkinum, og undir eftirliti av Toll- og Skattstovuni, men har ið vørurnar á goymsluni, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verða mettar at verða uttanfyri føroyska tolløkið. *Stk. 2.* Toll- og Skattstova Føroya kann á støðum, har ið serligur tørvur er, geva loyvi til, at sett verður á stovn frígoymsla til almenna nýtslu til at leggja upp vørur frá útlandinum í stytri ella longri tíð, uttan at tollur, mvg ella punktgjald skal rindast fyri tær. *Stk. 3.* Vanligu toll- og avgjaldsreglurnar fyri innflutning og tolleftirlit eru galdandi fyri vøruflutning frá frígoymslu og til restina av føroyska tolløkinum. Toll- og Skattstovan kann til vernd av toll- og avgjaldsviðurskiftum og til fremjan av teimum uppgávum, sum annars eru álagdar Toll- og Skattstovuni at røkja, fyriskriva reglur um eftirlit við frígoymslum. *Stk. 6.* Landsstýrið kann áseta reglur um í hvønn mun og undir hvørjum treytum høgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at verða smuglaðar, kunnu leggjast upp á frígoymslu. *Stk. 7.* Landsstýrið kann áseta neyvari reglur um stovnan, innrættan og nýtslu av frígoymslum, um ábyrgd hjá loyvishavara fyri tolli og avgjøldum, um trygdarstillan fyri tolli- og avgjøldum av teim vørunum, ið førdar verða á frígoymslu, um afturtøku av loyvum og nær ið loyvið annars fellur burtur.	§ 18 a. Sum frígoymsla er at skilja hølir, ið eru á føroyska tolløkinum, og undir eftirliti av TAKS, men har ið vørurnar á goymsluni, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verða mettar at verða uttanfyri føroyska tolløkið. *Stk. 2.* TAKS kann á støðum, har ið serligur tørvur er, geva loyvi til, at sett verður á stovn frígoymsla til almenna nýtslu til at leggja upp vørur frá útlandinum í stytri ella longri tíð, uttan at tollur, mvg ella punktgjald skal rindast fyri tær. *Stk. 3.* Vanligu toll- og avgjaldsreglurnar fyri innflutning og tolleftirlit eru galdandi fyri vøruflutning frá frígoymslu og til restina av føroyska tolløkinum. TAKS kann til vernd av toll- og avgjaldsviðurskiftum og til fremjan av teimum uppgávum, sum annars eru álagdar TAKS at røkja, fyriskriva reglur um eftirlit við frígoymslum. *Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um í hvønn mun og undir hvørjum treytum høgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at verða smuglaðar, kunnu leggjast upp á frígoymslu. *Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um stovnan, innrættan og nýtslu av frígoymslum, um ábyrgd hjá loyvishavara fyri tolli og avgjøldum, um trygdarstillan fyri tolli- og avgjøldum av teim vørunum, ið førdar verða á frígoymslu, um afturtøku av loyvum og nær ið loyvið annars fellur burtur.
§ 18 b. Sum fríøki er at skilja ávíst økið á føroyska tolløkinum, sum er undir eftirliti av Toll- og Skattstovuni, men sum, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verður mett at verða uttan fyri føroyska tolløkið.	§ 18 b. Sum fríøki er at skilja ávíst økið á føroyska tolløkinum, sum er undir eftirliti av TAKS, men sum, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verður mett at verða uttan fyri føroyska tolløkið.

Stk. 2. Landsstýrið kann í samráð við Toll- og Skattstovuna geva loyvi til at seta á stovn fríøki til almenna nýtslu, og tá ið talan er um íðnaðarvirksemi og serligur tørvur er á tí, geva loyvi til at seta á stovn fríøki til privata nýtslu. Landsstýrið ásetir í kunngerð neyvari reglur fyri fríøkjum, herundir eisini treytir fyri loyvisgevanini og fyri rakstrinum av fríøkjum. *Stk. 4.* Fríøkisvirksemi og tey virkir og goymslur, ið eru á fríøkinum, koma undir tær reglur, ið ásettar verða av landsstýrinum og Toll- og Skattstovu Føroya um eftirlit til vernd av toll- og avgjaldsáhugamálum og fyri annars at fremja tær uppgávur, ið álagdar eru Toll- og Skattstovuni at røkja. Hesar reglur vera galdandi bæði á markinum við fríøkið og á fríøkinum. *Stk. 5.* Toll- og Skattstova Føroya hevur rætt til allastaðni á einum fríøki at kanna flutningsfør og at eftirkanna persónar, tá ið hetta fer fram í samsvar við reglurnar í § 30, stk. 2 og 3. *Stk. 6.* Í tann mun Toll- og Skattstovan metir tað neyðugt til útinnan av eftirlitinum við fríøki, skal loyvishavari fyri egnan kostnað gera og viðlíkahalda gyrðingar av økinum, og á líknandi hátt stilla hóskandi høli á økinum til taks til toll- og skattamyndugleikan, um hetta verður kravt. *Stk. 9.* Landsstýrið kann áseta reglur um, í hvønn mun og við hvørjum treytum høgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at vera smuglaðar, kunnu leggjast á goymslu á fríøki. *Stk. 10.* Stovnan av íðnaðarvirksemi kann bert fremjast á fríøki við loyvi frá landsstýrinum. Í slíkum málum skal landsstýrið leita sær ummæli frá Toll- og Skattstovuni, áðrenn loyvi verður givið.	*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í samráð við TAKS geva loyvi til at seta á stovn fríøki til almenna nýtslu, og tá ið talan er um íðnaðarvirksemi og serligur tørvur er á tí, geva loyvi til at seta á stovn fríøki til privata nýtslu. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari reglur fyri fríøkjum, herundir eisini treytir fyri loyvisgevanini og fyri rakstrinum av fríøkjum. *Stk. 4.* Fríøkisvirksemi og tey virkir og goymslur, ið eru á fríøkinum, koma undir tær reglur, ið ásettar verða av landsstýrismanninum og TAKS um eftirlit til vernd av toll- og avgjaldsáhugamálum og fyri annars at fremja tær uppgávur, ið álagdar eru TAKS at røkja. Hesar reglur vera galdandi bæði á markinum við fríøkið og á fríøkinum. *Stk. 5.* TAKS hevur rætt til allastaðni á einum fríøki at kanna flutningsfør og at eftirkanna persónar, tá ið hetta fer fram í samsvar við reglurnar í § 30, stk. 2 og 3. *Stk. 6.* Í tann mun TAKS metir tað neyðugt til útinnan av eftirlitinum við fríøki, skal loyvishavari fyri egnan kostnað gera og viðlíkahalda gyrðingar av økinum, og á líknandi hátt stilla hóskandi høli á økinum til taks til TAKS, um hetta verður kravt. *Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, í hvønn mun og við hvørjum treytum høgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at vera smuglaðar, kunnu leggjast á goymslu á fríøki. *Stk. 10.* Stovnan av íðnaðarvirksemi kann bert fremjast á fríøki við loyvi frá landsstýrismanninum. Í slíkum málum skal landsstýrismaðurin leita sær ummæli frá TAKS
§ 21 *Stk. 2.* Toll- og Skattstova Føroya fremur tollpanting.	§ 21 *Stk. 2.* TAKS fremur tollpanting.
§ 22 *2. stk.* Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri uppkrevjan av tolli og neyðugar eftirlitsreglur. Somuleiðis kann landsstýrið áseta reglur fyri avskipan og avgreiðslu av vørum, ið verða sendar frá tolløkinum.	§ 22 *2. stk.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri uppkrevjan av tolli og neyðugar eftirlitsreglur. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin áseta reglur fyri avskipan og avgreiðslu av vørum, ið verða sendar frá tolløkinum.

§ 23. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná avgreiðslutíð.	§ 23. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá TAKS og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná avgreiðslutíð. *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tænastugjøld fyri avgreiðslur í førum, tá elektroniskar sjálvgreiðslur ikki verða brúktar.
§ 24 *2. stk.* Innflutningur av fiski, skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) og innflutningur av ídnaðarfiski (jbr. vørunummar 05.11.91.91-05.11.91.99 í toll- og vøruskránni) til útflutningsfyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram, uttan at tollur skal rindast í sambandi við innflutning. Eftir umsókn kann loyvast, at aðrar vørur, sum í høvuðsheitum verða nýttar í útflutningfyritøkum, hvørs søla beinleiðis ella í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram uttan, at tollur skal rindast í sambandi við innflutningin.	§ 24 *2. stk.* Innflutningur av fiski, skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) til útflutningsfyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram, uttan at tollur skal rindast í sambandi við innflutning. Eftir umsókn kann loyvast, at aðrar vørur, sum í høvuðsheitum verða nýttar í útflutningfyritøkum, hvørs søla beinleiðis ella í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram uttan, at tollur skal rindast í sambandi við innflutningin.
§ 25. Tá ið tolllætti ella annar fyrimunur kann fáast fyri vøru, sum útflutt verður sambært millumlanda avtalu, sum danska ríkisstýrið ger Føroya vegna ella av øðrum grundum, skal Toll- og Skattstovan, tá ið biðið verður um tað, vera til handa, um neyðugt er, við upplýsingum, váttanum viðvíkjandi uppruna, tollendurgjaldi v.m. *2. stk.* Toll- og Skattstovan kann sambært nærri ásettum treytum geva samtøkum, sum biðja um tað, góðkenning at geva út tey í 1. stk. tilskilaðu skjølini. *3. stk.* Í teimum førum, tá ið myndugleikarnir í einum stati, sum ratificerað hevur sáttmálan um stovningina av tí europeiska Fríhandilssamtakinum ella associeringssáttmála av tí, ella tá ið kommissiónin fyri Europeiska Felagsskapin ynskir at kanna eftir rættleikanum av skjølum viðvíkjandi uppruna, tollendurgjaldi v.m. viðvíkjandi vøru, sum útflutt er hiðani til viðkomandi statsøki og annars í føri, tá ið mál kemur upp, sum er rímilig grundgeving fyri at seta í verk slíka kanning, kann Føroya Toll- og Skattastovan krevja vinnurekandi upplýsingar um	§ 25. Tá ið tolllætti ella annar fyrimunur kann fáast fyri vøru, sum útflutt verður sambært millumlanda avtalu, sum danska ríkisstýrið ger Føroya vegna ella av øðrum grundum, skal TAKS, tá ið biðið verður um tað, vera til handa, um neyðugt er, við upplýsingum, váttanum viðvíkjandi uppruna, tollendurgjaldi v.m. *2. stk.* TAKS kann sambært nærri ásettum treytum geva samtøkum, sum biðja um tað, góðkenning at geva út tey í 1. stk. tilskilaðu skjølini. *3. stk.* Í teimum førum, tá ið myndugleikarnir í einum stati, sum ratificerað hevur sáttmálan um stovningina av tí europeiska Fríhandilssamtakinum ella associeringssáttmála av tí, ella tá ið kommissiónin fyri Europeiska Felagsskapin ynskir at kanna eftir rættleikanum av skjølum viðvíkjandi uppruna, tollendurgjaldi v.m. viðvíkjandi vøru, sum útflutt er hiðani til viðkomandi statsøki og annars í føri, tá ið mál kemur upp, sum er rímilig grundgeving fyri at seta í verk slíka kanning, kann TAKS krevja vinnurekandi upplýsingar um viðurskifti, ið hava týdning

viðurskifti, ið hava týdning fyri kanningina, og so langt endamálið ger tað neyðugt, eftirkanna høli, roknskapartilfar, brævaskifti v.m. hjá viðkomandi virki. *4. stk.* Landsstýrinum er heimilt at fyriseta gjøllari reglur viðvíkjandi starvi hjá nevndu myndugleikum eftir 1. og 3. stk.	fyri kanningina, og so langt endamálið ger tað neyðugt, eftirkanna høli, roknskapartilfar, brævaskifti v.m. hjá viðkomandi virki. *4. stk.* Landsstýrismanninum er heimilt at fyriseta gjøllari reglur viðvíkjandi starvi hjá nevndu myndugleikum eftir 1. og 3. stk.
§ 26. Í samráð við ríkismyndugleikarnar verður landsstýrinum heimilað at góðkenna alheims- ella samnorrønar sáttmálar um samstarv viðvíkjandi tolli.	§ 26. Í samráð við ríkismyndugleikarnar verður landsstýrismanninum heimilað at góðkenna alheims- ella samnorrønar sáttmálar um samstarv viðvíkjandi tolli.
§ 27 *Stk. 3.* Øll, ið koma undir hesa lóg, hava skyldu at leggja fyri Toll- og Skattstovu Føroya, tá ið hetta verður kravt, øll skjøl, ið kunnu vera til sannan av teimum gjøldum, ið verða áløgd við innflutningi. *Stk. 4.* Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild til at koma á staðið fyri at fremja eftirlit og útvega upplýsingar, sum hon heldur eru neyðugar fyri at fremja eftirlit eftir reglunum í hesi lóg.	§ 27 *Stk. 3.* Øll, ið koma undir hesa lóg, hava skyldu at leggja fyri TAKS, tá ið hetta verður kravt, øll skjøl, ið kunnu vera til sannan av teimum gjøldum, ið verða áløgd við innflutningi. *Stk. 4.* TAKS hevur heimild til at koma á staðið fyri at fremja eftirlit og útvega upplýsingar, sum hon heldur eru neyðugar fyri at fremja eftirlit eftir reglunum í hesi lóg.
§ 28 *2. stk.* Skip, ið tollvaldið ætlar at kanna, og sum sigla, skulu leggja stilt, tá ið tollvaldið krevur tað.	§ 28 *Stk. 2.* Skip, ið tollvaldið ætlar at kanna, og sum sigla í føroyskum tolløki, skulu leggja at føroyskari bryggju, tá ið tollvaldið krevur tað. Skip í skaðaleysari gjøgnumsigling eru undantikin hesum kravi. *Stk. 8.* Fyritøka, ið rekur ferðafólkaflutning ella tann, ið førir skip ella flogfar, sum flytur ferðafólk til ella úr Føroyum, hevur skyldu at lata tollvaldinum tøkar upplýsingar um ferðafólk og manning til tolleftirlitsendamál. Tollvaldið kann fáa beinleiðis atgongd til skipan hjá tí, ið rekur ferðafólkaflutning. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um upplýsingarskylduna, harundir at upplýsingarnar skulu latast ella gerast tøkar fyri tollvaldinum elektroniskt í serligum formati. *Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at havnarmyndugleikar og flogferðslumyndugleikar skulu lata tollvaldinum tøkar upplýsingar um komu og fráferð hjá skipum, bátum og flogførum, um uppskipan og avskipan av vørum og um ílandsetan og umborðtøku av ferðafólki.
§ 28 a. Føroya Landsstýri ásetir reglur um, í hvønn mun og undir hvørjum treytum skip	*§ 28 a.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um, í hvønn mun og undir hvørjum treytum skip

og flogfør kunnu taka við og proviantera toll- og avgjaldsfrían proviant og aðrar neyðsynjarvørur at nýta umborð ella at selja til ferðafólk.	og flogfør kunnu taka við og proviantera toll- og avgjaldsfrían proviant og aðrar neyðsynjarvørur at nýta umborð ella at selja til ferðafólk.
§ 29. Ferðandi, ið ferðast til ella frá tolløkinum, skulu við komu og fráferð, uttan at biðið verur um tað, steðga til tolleftirlit og skulu annars, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit. *2. stk.* Persónar, ið hava verið umborð á skipum ella flogførum, ella sum ferðast fram við strondunum, í havnum, á flogvøllum og atløguplássum, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit. *3. stk.* Teir í 1. og 2. stk. nevndu persónar og persónar umborð á skipi og flogfari, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, uppgeva navn og bústað. *6. stk.* Tær í 5. stk. nevndu fráboðanir og upplýsingar kunnu gevast munnligt, tá ið vørurnar ikki verða innfluttar við vinnuligum endamáli, uttan so at tollvaldið heldur tað vera neyðugt, at fráboðanirnar og upplýsingarnar skulu gevast skrivliga.	§ 29. Ferðandi, ið ferðast til ella frá tolløkinum, skulu við komu og fráferð, uttan at biðið verur um tað, steðga til tolleftirlit og skulu annars, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit. *2. stk.* Persónar, ið hava verið umborð á skipum ella flogførum, ella sum ferðast fram við strondunum, í havnum, á flogvøllum og atløguplássum, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, steðga til tolleftirlit. *Stk. 3.* Ferðandi til ella frá tolløkinum, sum hava við sær tøkan pening samsvarandi 10.000 evrur ella meira, skulu, uttan at biðið verður um tað, steðga til tolleftirlit og hava skyldu at boða tollvaldinum frá øllum tøkum peningi, tey hava við sær. § 27 b um fyrisitingarligt eftirhald verður nýtt samsvarandi. *Stk. 4.* Teir í stk. 1-3 nevndu persónar og persónar umborð á skipi og flogfari, skulu, tá ið tollvaldið krevur tað, uppgeva navn og bústað. Eru tekin um ólógligt virksemi í sambandi við flutning av tøkum peningi, kann tollvaldið krevja, skráseta og viðgera upplýsingar um persónin og tøka peningin. Tollvaldið kann krevja skjalprógvan av upplýsingunum. *Stk. 7.* Tær í stk. 6 nevndu fráboðanir og upplýsingar kunnu gevast munnligt, tá ið vørurnar ikki verða innfluttar við vinnuligum endamáli, uttan so at tollvaldið heldur tað vera neyðugt, at fráboðanirnar og upplýsingarnar skulu gevast skrivliga. *Stk. 10.* Ásetingin í stk. 9 er somuleiðis galdandi fyri persónar, sum hava ella kunnu ætlast at hava við sær tøkan pening, samsvarandi við 10.000 evrur ella meira, ella sum hava ella kunnu ætlast at hava við sær vørur, sum av trygdarorsøkum, heilsuorsøkum, djóralæknafrøðiligum orsøkum, plantupatologiskum orsøkum, gjaldoyra orsøkum ella øðrum orsøkum eru bannaðar innflutningi, útflutningi ella transit.

§ 30 *3. stk.* Eftirkanning, ið ikki bert avmarkast til uttanáklæðini, má bert gerast, tá ið nóg góðar grundir eru til at halda, at viðkomandi hevur nakrar ólógligar vørur uppi á sær v.m., og bert eftir boðum frá ovasta hjáverandi tollyvirmanni. Tann, ið eftirkannaður verður, kann krevja sær vitni at vera hjá undir eftirkanningini. Til eftirkanningina krevst, at tann, ið kannar ella hjástaddur er, skal vera av sama kyni, sum tann, ið eftirkannaður er.	§ 30 *3. stk.* Eftirkanning, ið ikki bert avmarkast til uttanáklæðini, má bert gerast, tá ið nóg góðar grundir eru til at halda, at viðkomandi hevur nakrar ólógligar vørur uppi á sær v.m. Tann, ið eftirkannaður verður, kann krevja sær vitni at vera hjá undir eftirkanningini. Til eftirkanningina krevst, at tann, ið kannar ella hjástaddur er, skal vera av sama kyni, sum tann, ið eftirkannaður er.
Kap. 9a. **Rentur**	**Kap. 9a.** **Rentur og innheinting**
	§ 30b. Tollur, rentur, sektir og gjøld, sum eru fallin til gjaldingar, kunnu verða innheintað við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innheinting av skattum, tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgiter til det offentlige m.m. ikki galdandi. *Stk. 2.* TAKS er eisini heimilað at innheinta skuld og innkrevjingarkostnað við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum skyldugu sambært reglunum um hetta í skattalógini.
§ 31. Við sekt verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni: 1. Ikki boðar tollvaldinum frá vørur, ið verða fluttar inn á ella av tolløkinum, ella vørur, ið verða fluttar inn á ella frá fríhavn, ella frígoymslu á tolløkinum, tá ið hetta er ásett í fyriskipan smb. hesi lóg. 2. Burturflytur vørur, ið eru undir tollstongsli, ella sum eru á transitgoymslu. 3. Brúkar ótollaðar vørur, jbr. tó § 33. 4. Brúkar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld eftir § 8. 5. Selur ella á annan hátt avhendar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld smb. § 8, móti teimum fyri toll- og avgjaldsfrítøkuni ásettu treytum. 6. Tekur vørur frá flutningsfari ella á annan hátt afturheldur vørur, ið eru givnar upp til útflutnings móti endurrindan av ella frítøku fyri toll og avgjøldum, ella móti fráskriving í	§ 31. Við sekt verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni: 1. Ikki boðar tollvaldinum frá vørur, ið verða fluttar inn á ella av tolløkinum, ella vørur, ið verða fluttar inn á ella frá fríhavn, ella frígoymslu á tolløkinum, tá ið hetta er ásett í fyriskipan smb. hesi lóg. 2. Burturflytur vørur, ið eru undir tollstongsli, ella sum eru á transitgoymslu. 3. Brúkar ótollaðar vørur, jbr. tó § 33. 4. Brúkar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld eftir § 8. 5. Selur ella á annan hátt avhendar vørur, ið eru frítiknar fyri toll og avgjøld smb. § 8, móti teimum fyri toll- og avgjaldsfrítøkuni ásettu treytum. 6. Tekur vørur frá flutningsfari ella á annan hátt afturheldur vørur, ið eru givnar upp til útflutnings móti endurrindan av ella frítøku fyri toll og avgjøldum, ella móti fráskriving í

upplag uttan at geva tað upp til tollvaldið. 7. Ikki boðar tollvaldinum frá tøkum peningi, sbrt. § 27 a, stk. 2. *2. stk.* Er gerðin framd við tilætlan til at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, verður hon revsað við sekt ella fongsul upp til 2 ár. *3. stk.* Á sama hátt, sum ásett í 2. stk. verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni selur ella á annan hátt avhendar, keypir ella á annan hátt tekur ímóti, flytur ella goymir smuglaðar vørur. *4. stk.* Brot á 1.-3. stk. hevur við sær skyldu at gjalda toll- og avgjaldsupphæddina fyri vøruna.	upplag uttan at geva tað upp til tollvaldið. *2. stk.* Er gerðin framd við tilætlan til at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, verður hon revsað við sekt ella fongsul upp til 2 ár. *3. stk.* Á sama hátt, sum ásett í 2. stk. verður hann revsaður, ið við tilætlan ella av grovum ósketni selur ella á annan hátt avhendar, keypir, ognar sær ella á annan hátt tekur ímóti, flytur ella goymir smuglaðar vørur. *4. stk.* Brot á 1.-3. stk. hevur við sær skyldu at gjalda toll- og avgjaldsupphæddina fyri vøruna.
§ 35. Við sekt ella fongsul upp til 6 mánaðir verður hann revsaður, ið uttan at gerðin fevnir um § 31, tilætlað ella av grovum ósketni: 1. Brýtur ella tekur burtur ein av tollvaldinum ásettan tollstongsul ella ger hendan nyttuleysan, ella tekur burtur av tollvaldinum ásett eyðkennismerki. 2. Ikki lýkur skyldu til at frambjóða vørur, ið eru undir tollstongsli fyri tollvaldinum.	§ 35. Við sekt ella fongsul upp til 6 mánaðir verður hann revsaður, ið uttan at gerðin fevnir um § 31, tilætlað ella av grovum ósketni: 1. Brýtur ella tekur burtur ein av tollvaldinum ásettan tollstongsul ella ger hendan nyttuleysan, ella tekur burtur av tollvaldinum ásett eyðkennismerki. 2. Ikki kann vísa á vørur, ið eru undir tollstongsli fyri tollvaldinum.
§ 36. ið bót verður hann revsaður, ið tilætlað ella av grovum ósketni: 1. Ikki gevur upplýsingar, ið tollvaldið kann krevja av honum sambr. § 28, 3. stk. 2. Ikki fylgir einum smb. § 27, 2. stk. ella § 28, 3., 5. ella 6. stk. ásettum boði. 3. Brýtur ella roynir at bróta § 28, 2., 4. og 6. stk. og § 29, 1.-3. og 5. stk. 4. Brýtur § 14, 1. stk.	§ 36. ið bót verður hann revsaður, ið tilætlað ella av grovum ósketni: 1. Ikki gevur upplýsingar, ið tollvaldið kann krevja av honum sambært § 28, stk. 3 og 8. 2. Ikki fylgir einum sambært § 27, stk. 2, § 28, stk. 3, 5, 6 ella 8 ásettum boði. 3. Brýtur ella roynir at bróta § 27a, stk. 2, § 28, stk. 2, 4 ella 6 ella § 29, stk. 1 – 4 ella 6. 4. Brýtur § 14, 1. stk. 5. Ikki letur upplýsingar elektroniskt sbrt. § 10b, stk. 1, sbr. tó § 10b, stk. 2.
§ 37 *2. stk.* Sektir, ið tollvaldið áleggur, fara í landskassan. Landsstýrið kann tó eftir fyriliggjandi umstøðum lætta um ella eftirgeva tílíkar sektir. *Stk. 6.* Toll- og Skattstova Føroya fremur pantingina.	§ 37 *2. stk.* Sektir, ið tollvaldið áleggur, fara í landskassan. Landsstýrismaðurin kann tó eftir fyriliggjandi umstøðum lætta um ella eftirgeva tílíkar sektir. *Stk. 6.* TAKS fremur pantingina.

§ 39. Vørur, ið finnast undir smugling ella roynd til tess, ella við kanning sambært § 29, 8. stk. verða tiknar í varðveitslu av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna. Annars kunnu innsmuglaðar vørur ella aðrar vørur, sum tollur og avgjøld ikki eru rindað av ella roynt hevur verið at sloppið undan at rinda toll og avgjøld av, takast í varðveitslu, ella hald kann leggjast á tær av teimum nevndu myndugleikunum undir teimum treytum, ið eru ásettar í rættargangslógini §§ 782 og 783 um haldlegging á lutum, ið mettir verða at skula konfiskerast.	§ 39. Vørur, ið finnast undir smugling ella roynd til tess, ella við kanning sambært § 29, stk. 9 og 10 verða tiknar í varðveitslu av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna. Annars kunnu innsmuglaðar vørur ella aðrar vørur, sum tollur og avgjøld ikki eru rindað av ella roynt hevur verið at sloppið undan at rinda toll og avgjøld av, takast í varðveitslu, ella hald kann leggjast á tær av teimum nevndu myndugleikunum undir teimum treytum, ið eru ásettar í rættargangslógini §§ 782 og 783 um haldlegging á lutum, ið mettir verða at skula konfiskerast.
§ 40. Flutningsfør, ið hava verið nýtt til innsmugling ella roynd til innsmugling av vørum ella til flutning av sovorðnum innsmuglaðum vørum á tolløkið, kunnu haldast aftur av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna, til tær toll- og avgjaldsupphæddir og sakarmálskostnaður, ið skyldast av ánara ella skipara, manning ella øðrum í tænastu á flutningsfarinum, eru goldnar ella trygd veitt fyri hesum. Hendir hetta ikki áðrenn 2 mánaðir aftaná, at málið er endaliga avgjørt, kann ágóðin innheintast í flutningsfarinum.	§ 40. Flutningsfør, ið hava verið nýtt til innsmugling ella roynd til innsmugling av vørum ella til flutning av sovorðnum innsmuglaðum vørum á tolløkið, kunnu haldast aftur av tollvaldinum ella av løgregluni tollvaldsins vegna, til tær toll- og avgjaldsupphæddir, sektarupphæddir og sakarmálskostnaður, ið skyldast av ánara ella skipara, manning ella øðrum í tænastu á flutningsfarinum, eru goldnar ella trygd veitt fyri hesum. Hendir hetta ikki áðrenn 2 mánaðir aftaná, at málið er endaliga avgjørt, kann ágóðin innheintast í flutningsfarinum.